# Toftamenninir flongdu niðurflytararnar

**VODAFONEDEILDIN** Ibrahima Camara, Jóhan Petur Poulsen og André Olsen stóðu fyri málunum, tá B68 vann greitt á AB

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| B68 | 3 |
| AB | 0 |

Landskappingardysturin á Toftum í dróg ikki nógvar áskoðarar til sín.

Tað er einki løgið í tí.

Tað er longu greitt, at B68 verða nummar sjey í røðini, tá seinastu leikumfar er spælt. AB verður aftast og flytir niður.

Tí stóð einki upp á spæl. Dysturin varð spældur á grasvøllinum á Svangaskarði, tí ov nógvur vindur var kring graslíkivøllinum, sum hevði við sær, at vøllurin kundi ikki brúkast.

Úrslitið var 3-0. Ibrahima Camara legði heimaliðið á odda við brotssparki, og Jóhan Petur Poulsen økti um leiðsluna, tá fimm minuttir restaðu í av fyrra hálvleiki. André Olsen skeyt seinasta málið miðskeiðis í seinna umfarinum.

Bill Mc. Jacobsen, venjari hjá B68, er nøgdur.

– Dysturin var sjálvandi merktur av, at liðini hava lítið og einki at spæla fyri. Vit vóru omaná og fingu trý uppiborin stig afturat í skjáttuna, sigur Bill Mc. Jacobsen, sum heldur fram sum venjari hjá toftamonnum í 2011.

uni@sosialurin.fo

# Øssur Hansen takkar fyri seg

**FÓTBÓLTUR** Aftaná 23 ár millum teir bestu fótbóltsspælararnir í landinum, takkar Øssur Hansen nú fyri seg

Uni Holm Johannesen



*Øssur Hansen takkar fyri seg*

Øssur Hansen spældi sín seinasta dyst í bestu fótbóltsdeildini í gjár. Ein av stóru profilunum í føroyskum fótbólti takkar nú fyri seg.

Toftamaðurin spældi fyri fyrstu ferð í bestu deildini í 1987. Hansen hevur spælt flestu dystirnar hjá B68 síðan, og hann hevur eisini vunnið sær sertakt pláss hjá fótbóltsfjepparunum á Toftum.

Øssur Hansen var í fleiri ár ein av stuðulsleikarunum á føroyska landsliðnum. Umframt, at hann var stinnur í verjuspælinum, skeyt hann tvey sera týdningarmikil mál. Hann javnaði við brotssparki, tá Føroyar vunnu 2-1 á útivølli móti Malta í 1997. Fimm ár seinni sendi hann søguliga frísparki avstað í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, tá føroyska landsliðið spældi 2-2 á Svangaskarði móti Slovenia.

Øssur Hansen hevur eisini spælt við GÍ og B36.

Hann noyddist av vøllinum við skaða í gjár, tá B68 vann 3-0 móti AB.

# EB/Streymur livir í vónini



*Við tryggum 4-0 sigri á sandoyingum, varveitur EB/Streymin FM vónina*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**VODAFONEDEILDIN** Sandoyingar kláraðu at standa ímóti sterka álopsliðnum úr Sundalagnum í 55 minuttir. Men tá gestirnir so fingu hol á, so gjørdist talan um ein stórsigur, tí sandoyingar ikki megnaðu at renna kapp við formsterku gestirnar, sum at enda vunnu 4-0. Úrslitið hevur við sær at EB/Streymur heldur lív í vónini at vinna FM, meðan botnurin brennur undir sandoyingum

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| B71 | 0 |
| EB/Streymur | 4 |

EB/Streymur er formsterkasta liðið í Vodafonedeildini í løtuni. Við sigrinum á B71, hevur EB/Streymur fingið 26 stig til hølvdar síðani summarsteðgin, og tað hevur einki annað Vodafonelið megnað. Góða gongdin hjá sundalagsmonnum hevur við sær, at teir nú eru einasta liðið, sum kann hótta HB í FM stríðnum.

Orsøkin til jaligu gongdina hjá sundalagsmonnum, skyldast í stóran mun, at tað er ein góð javnvág millum verjupartin og álopspartin á liðnum. Hetta hevur við sær at profilar, so sum Arnbjørn og Hans Pauli, rættuliga eru komnir fyri seg. Teir báðir vóru eygsýndir í dystinum ímóti B71 sunnudagin, har teir skoraðu tvey mál í part.

## Korthúsið fall

B71 kláraði at halda gestunum frá fatinum í 55 minuttir. Men eftir at EB/Streymur hevði lagt seg á odda, so fall korthúsið hjá sandoyingum saman. Hetta tí teir nú vóru noyddir fram á vøllin, og tá komu manglarnir á liðnum rættuliga til sjóndar. Símun Hansen royndi, men EB/Streymur hevði sum heild tamarhald á honum, og hinum sandoyingunum.

Úrslitið hevur við sær at støðan er óbroytt í botnstríðnum, har sandoyingar eru eitt stig frammanfyri suðuroyingar. Tískil er avgerðin, um hvør skal flyta niður í 1. deild saman við AB, útsett til síðsta umfar.

## Bragdaði eftir steðgin

Eftir ein málleysan fyrra hálvleik, har sundalagsmenn høvdu leikliga yvirvág, so kom meira gongd í eftir steðgin. Tá 10 minuttir vóru spældir av seinra hálvleiki, bragdaði hjá EB/Streymi, tá Hans Pauli Samuelsen fekk bóltin framvið Markovic í B71 málinum.

Tað var sum um leiðslumálið tók luftina frá sandoyingum, meðan gestirnir fingu nýggja megi. Tískil var tað fult í trá við dystargondina, tá Hans Pauli økti um leiðsluna, eitt gott korter fyri dystarlok.

Síðstu 10 minuttirnar fingu sundalagsmenn tvey mál afturat, sum toppskjúttin í Vodafonedeildini, Arnbjørn Hansen, stóð fyri.

Sostatt vann EB/Streymur at enda ein uppibornan 4-0 sigur á B71. Úrslitið hevur við sær at, avgerðin í oddastríðnum, eins væl og í botnstríðnum, er útsett til síðsta umfar í Vodafonedeildini, sum verður komandi vikuskifti.